# Edward Fuglø

## f. 1965



Edward Fuglø er ein fjølbroyttur listamaður. Umframt at málað og teknað hevur hann myndprýtt bøkur og frímerki, sett upp pallmyndir og gjørt leikbúnar, harímillum til ein føroyskan film.

**Koloni, 2006**

Edward fór í 2001 at mála fuglar í klædningum, slipsi og kritahvítari skjúrtu. Hetta myndevnið kom at hava stóran týdning fyri listamannin, sum millum aðrar fuglamyndir málaði myndina *Koloni* við súlum í klædningi í 2006.

Súlan mitt í myndini hevur fagurblá og avgjørd eygu og lyftir høvdið eitt vet til síðis. Út frá andlitsbránum at meta er hon framskygd og hevur greiðar ætlanir. Hóast hinar súlurnar hyggja hvør til sína síðu og ikki tykjast eins framskygdar, so halda tær seg til súluna í miðjuni og gerast soleiðis útrættir veingir hjá henni. Ein og sama leið - ein maktfull stjórn við greiðum politikki, og tað er líka mikið, um tað er ein føroyskur løgmaður, ein danskur forsætisráðharri ella ein amerikanskur forseti.



Edward Fuglø, *Koloni* 2006

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Vendir høvdið á mittastu súluni til tína? vinstru lið ☐ ella høgru lið ☐

♠ Etur súlan? fisk ☐ ella plantur ☐

♠ Eru súlur etandi? ja ☐ nei ☐

♦ Hvussu nógvar súlur sært tú í myndini?

♦ Hví heldur tú, at súlurnar eru í klædningi?

♣ Heldur tú, at mittasta súlan hevur veingir?

♣ Lýs verkið stutt við tínum egnu orðum?

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________